SMS inn á Skálafjørðin

Seinastu tíðina hava søgur gingið um, at SMS í Havn hevur í umbúna at byggja eina nýggja sølumiðstøð á Lambareiði. Hvørki stjórin í SMS, Hans Mortensen ella býráðsformaðurin í Runavíkar kommunu, Rodmundur Nielsen, avsanna hesar ætlanir

HANDIL
Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo

Mangt bendir á, at SMS nú setir kikaran á Skálafjørðin

Mangt bendir á, at SMS í Havn nú vendir kikaranum móti Skálafjørðinum.

Seinastu tíðina hava søgur gingið um, at sølumiðstøðin í høvuðsstaðnum ætlar at byggja eitt nýtt SMS eystanfyri vegin niðan á Hústoft í Lamba, sum Runavíkar kommuna nú vil hava lagt út til handilsøki.

Hvørgin av stjórunum í SMS, Hans Mortensen og Niels Mortensen, vilja vátta hesi tíðindi, men teir vilja heldur ikki avsanna tey.

– Vit hava eisini hoyrt søgurnar, men hava onga viðmerking til málið, er svarið.

Spurdur, um hann vil avsanna tíðindini, leggur Hans dent á, at hann framvegis onga viðmerking hevur.

Niels sigur hinvegin, at hann vil ikki avsanna hesi tíðindi.

Handilsøki

Sosialurin vendi sær til Rodmund Nielsen, býráðsformann í Runavíkar kommunu og spurdi hann beinleiðis, um SMS hevur søkt um øki til eitt SMS í kommununi.

– Eg vil ikki ordiliga vátta ella avsanna tíðindini, men eg kann siga, at vit hava fleiri fyrispurningar, og samrøður og samráðingar eru um ymiskt við atliti til handilslívið í kommununi, sum Rodmundur tekur til.

Runavíkar býráð hevur annars einmælt samtykt at leggja økið, sum er eystanfyri vegin niðan á Hústoft í Lamba, til handilsøki.

– Neyðugt er í hesum sambandi at broyta býarætlanina, tí hetta øki, sum í dag er hagi, er sum í flestu øðrum kommunum eitt landbúnaðarøki.

12000 fermetrar

Býráðsformaðurin sigur, at ætlanin er framløgd, men helst fer tað at taka eitt hálvt ár ella so, áðrenn tey formellu viðurskiftini eru komin uppá pláss.

Økið, sum talan er um, er í fyrstu syfti einar 12.000 fermetrar stórt.

Rodmundur Nielsen váttar, at ymiskt er í stoypiskeiðini og samráðingar eru við ymiskar partar innan handilsvinnuna um nýtslu av økinum.

– Men tað fyrsta, vit mugu gera, er at fáa neyðugu formalitetirnar uppá pláss, sigur hann.



Sølan í SMS er stagnerað

– Vit duga ikki at siga, um sølan sum heild er minkað, men hon er í øllum førum stagnerað, og fólk ansa betur eftir, hvat tey keypa, sigur Hans Mortensen, stjóri í SMS

SØLA
Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo

Samstundis, sum arbeiðsloysistølini veksa, merkir handilslívið eisini, at sølan er stagnerað. Enn er nakað tíðliga at siga, um sølan sum heild er minkað, tí eingi hagtøl eru, sum siga, at so er.

Hans Mortensen, stjóri í SMS, sum hann hevur skilt á handlunum í sølumiðstøðini, eru fólk farin at ansa betur eftir, hvat tey keypa.

– Eg tori ikki at siga, at sølan er minkað nakað av týdningi, men tað er í øllum førum greitt, at hon er stagnerað.

Stjórin sigur, at tey, sum í fyrsta lagi merkja stagnatiónina, eru handlar, sum selja tær dýraru brúksvørurnar.

– Tað vísir seg, at matvørurnar eru tað seinasta, fólk spara uppá, tá ið keypiorkan minkar – ella fólk gerast meira varin. Hinvegin kunnu vit síggja, at fólk eru meira umhugsin og keypa øðrvísi í dag, sigur Hans Mortensen.

Hann vil tó ikki tosa um nakra kreppu, tí enn er ov tíðliga at siga, hvussu samfelagsgongdin og harvið keypiorkan verður.

– Eg trúgvi, at handlarnir í SMS sum heild hava havt eina minni sølu í januar og februar í ár í mun til somu tíð í fjør, men í løtuni kenni eg eingi hagtøl, sum siga, at so er. Tískil dugi eg heldur ikki at siga, um talan yvir eitt longri tíðarskeið er um eina afturgongd ella bert um eina stagnatión, sigur Hans Mortensen.

Tilsamans 28 handlar eru í sølumiðstøðini í høvuðsstaðnum.

Serfrøðingar:

Serundirvísingin má umskipast

Í grannalondum okkara verður skipanin við serundirvísing skuldsett fyri at gera børn til "outsidarar" og mælt verður til aðra skipan, har børn ikki fara úr skúlatímunum og har m.a. sálarfrøðingar spæla annan leiklut. Og eisini í Føroyum eru røddir, sum taka undir við hesum hugsanum og sum meta núverandi skipan vera ótíðarhóskandi og ikki til frama fyri børn og skúla.

SERUNDIRVÍSING
Dagfinn Olsen
dagfinn@sosialurin.fo

Magnus Hansen , lærari og sálarfrøðingur, røkti í hálvttriðja ár skúlastjórastrvið á Sernámsdeplinum. Ulf Nordlund er tónleikalærari og útbúgvin serlærari. Hann hevur drúgvar og góðar royndir við við sínum fráleruhættum innan tónleik. Báðir eru teir samdir við sjónarmiðunum, sum Niels Egelund, professari, leggur fram, um at serundirvísing kann fáa næmingar at kenna seg øðrvísi og teirra sjálvsvirði lækkar

Mynd; D. Olsen

Í Danmark er tað serundirvísingin og børn við serligum tørvi, sum eru á breddanum og bløðini eru á tremur um evnið. Serliga ein kanning hjá Niels Egelund professara, hevur vakt ans. Hann mælir til, at færri diagnosur verða settar, heldur skal arbeiðsorkan nýtast øðrvísi og næmingar skulu ikki takast út úr flokshølunum, tí hetta setur næmingar uttanfyri í flokshøpi og teirra sjálvsvirði lækkar.

Greinar í Berlingske Tidende 15. og 16. februar taka evnið upp. Niðurstøðan er, at serundirvísingin í skúlunum tekur sjálvsvirðið frá næmingunum og fær næmingarnar at kenna seg øðrvísi og uttanfyri felagsskapin í skúlanum. Hetta verður bygt á kanningina hjá Niels Egelund.

Mett verður, at í Danmark er talan um eina "diagnostiseringsmentan", sum m.a. sæst á, at í Danmark eru 10 ferðri so nógvir sálarfrøðingar, sum í Svøríki, har kanningin vísir, at næmingarnir har ikki í sama mun sum í Danmark kenna til nevndu fyribrigdi.

Í Svøríki tekur skúlaleiðarin avgerðina um serundirvísing saman við foreldrum, men í Danmark skal fyrst ein sálarlig kanning til, og hetta metir Egelund førir til, at barnið kann kenna seg stemplað sum øðrvísi.

Øll skipanin skal takst við í Danmark og tað tekur langa tíð, mánaðir. Mett verður, at um lesivegleiðarin og sálarfrøðingurin ístaðin komu í flokkarnar og hjálptu lærarunum, høvdu næmingarnir ikki fingið kensluna av at kenna seg býttar og teir høvdu møguliga ikki lagt til merkis, at teir fingu serundirvísing, verður sagt í greinunum.

Skolens smertensbarn
Specialundervisning gør børn til out

Serundirvísing hevur av álvara verið á breddanum í Danmark. Eisini í Føroyum eru tað tey sum meta, at broytingar eru neyðugar

Eisini kemur fram, at tað í stóran mun eru foreldur, ið krevja serundirvísing og sálafrøðiliga hjálp, men mælt verður frá at síggja hetta sum einastu loysn, tí tað eru aðrir møguleikar.

Støðan í Føroyum

Í Føroyum hava dømi verið frammi um, at skipanin á økinum sum heild ikki virkar nóg væl. Sendingin t.d. um Marthu í Svf fekk lív í kjakið kring landið.

Eins og í Danmark, so eru eisini í Føroyum eru røddir, sum tala fyri broytingum í skipanini. Vit hava hitt Magnus Hansen, sum í hálvttriðja ár var skúlastjóri á Sernámsdeplinum. Hann er lærari og sálarfrøðingur og er í dag farin aftur í gamla starv sítt sum lærari í Vágs Skúla.

Ulf Nordlund er tónleikalærari í Suðuroynni og er annars eisini útbúgvin serlærari. Ulf hevur fleiri ára royndir við sínum undirvísingarhættum, sum hava givið góð úrslit og hugsanini við tónleikaundirvísingini er sambært Ulf eisini, at hetta styrkir í øðrum fakum og eisini næmingar, sum her uppliva felagskap.

– Orsøkin til støðuna er, at diagnosa skal fáast, áðrenn nakrir pengar eru at fáa. Støðan er kanska ikki líka ring í Føroyum, sum í Danmark, men tendensurin er hin sami; eingin diagnosa, eingir pengar, sigur Magnus Hansen.

– Kanska hevði tað verið eitt hugskot at gjørt sum sagt verður í greinunum - at latið skúlaleiðslurnar eisini umsita játtanina til serligan tørv og uttan at leggja nakran undir nakað, so er helst ein góð mynd at nýta her, at næmingar sum nú er verða tiknir til gísla, tá ið pengar skulu verða játtaðir og hetta er ikki nøktandi, sigur Magnus Hansen.

– Skipanin sum heild er stirvin og krevur óivað broytingar, sigur Magnus Hansen um sínar royndir sum skúlastjóri á Sernámsdeplinum.

– Okkurt av hesum, sum er frammi í føroyska kjakinum nú, var uppi fyri tveimum árum síðani, men tað er bara einki hent enn. Tað vísir seg, at tað skal ein sending í sjónvarpi til, áðrenn gongd kemur á, sigur Magnus Hansen.

– Sálarfrøðingarnir eru ovbyrjaðir av arbeiði, sum fyri tað mesta er at diagnostisera, kanska hevði teirra vitan og royndir komið meira til sín rætt, um teir høvdu virkað sum konsulentar í flokshølunum. Hetta hevði óivað verið ein betri loysn bæði fyri skúlan og fyri teirra egna arbeiði, siga Magnus Hansen og Ulf Nordlund.

Tónleikur stimbrar

- At fáa næmingar við serligum tørvi til tónleikaundirvísing er stimbrandi fyri hini fakini eisini, vísa royndir. Og so gera tey nakað í flokki, og tað hevur týdning. Júst hetta við at gera nakað saman hevur týdning og í minnarí verð hava einkult tímar við næmingum ongantíð givið ta stóru meiningina og betri úrslit fáast við at hava felagstímar, sigur Ulf Nordlund, sum leggur dent á, at hann her sipar til, at munur ikki verður gjørdur á nýbyrjarum og royndum næmingum, tí sjálvsagt er hann ikki beinleiðis ímóti einkulttímum í tónleikaundirvísingini. Eisini ger Ulf vart við, at hansara ikast til kjakið er frá einum sjónarhorni, sum hevur við tónleikin at gera.

– Tað er einki at taka seg aftur í, at tað hjálpir, tá tónleikur er inni í myndini, og tí er tað eina roynd vert a knýta Fólkaskúlan og Musikkskúlan tættari saman, metir Ulf Nordlund.

Magnus Hansen og Ulf Nordlund eru samdir um, at tað at taka børn út úr tímunum lækkar sjálvsvirði hjá børnunum og er ein vána loysn.

– Vit eiga ikki at taka børnini úr tímunum og stempla tey sum "serbørn". Betri er at hava tey í felagskapinum, har tey ikki kenna seg sum nakað serstakt, men hinvegin eru við í nøkrum sum eydnast saman við øllum hinum, sigur Ulf Nordlund.

– Áhugavert hevði verið við evnisdegi um evnið. Hesin kundi møguliga verið í Suðuroynni. Fyrilestrahaldarar úr Føroyum kundu lagt fyri og møguliga kundu børn spælt tónleik. Kjak kundi verið og tað góða er, at vit hava serfrøðingar í landinum og okkum nýtist ikki at leita aðrastaðni eftir fólki at koma hendaveg at hava fyrilestur, sigur Ulf Nordlund, við hugsanini um slíkan evnisdag.

Fakta

Nýggj kannig í Danmark hjá Niels Egelund, professara, sigur, at serundirvísing ger næmingar til útskot - "outsidarar", ið verða settir uttanfyri flokkin og teirra sjálvsvirði lækkar. Mælt verður frá at taka næmingar út úr flokkunum til serundirvísing.

Næmingar, ið fáa serundirvísing, verða sagdir at kenna einsemi, kenna seg sum útskot - outsidarar, teir hoyra ikki heima og tíma ikki í skúla.

Mælt verður til serlærarar í flokkinum, sum stuðla læraran, og sálarfrøðingar skulu út í flokkarnar at hjálpa lærarunum. Næmingarnir sleppa soleiðis undan at fáa diagnosu, sum kann vera ein skakandi uppliving.

Støðan í Føroyum er ikki betri ella verri enn í Danmark, siga tveir serfrøðingar við Sosialin, men føroyska skipanin verður søgd at vera stirvin og tørva broytingar. Ætlanin er at skipa fyri evnisdegi hesum viðvíkjandi.

Magnus Hansen er lærari og sálarfrøðingur og røkti í hálvttriðja ár starvið sum skúlastjóri á Sernámsdeplinum.

Ulf Nordlund er tónleikalærari og eisini útbúgvin serlærari. Hann hevur góðar royndir við sínum fráleruhættum innan tónleikin.

Eivør goes opera

TÓNLEIKUR
Dagfinn Olsen
dagfinn@sosialurin.fo

Soleiðis siga yvirskriftirnar í Íslandi í hesum døgum og rætt er, at Eivør Pálsdóttir nú roynir seg innan operasang. Fram er eisini komið, at íslendarar meta Eivør vera tekkiligt sprund

30 ár eru síðani Sangskúlin í Reykjavík byrjaði og hetta verður hátíðarhildið við tveimum konsertum um vikuskiftið. Eivør hevur havt tilknýti til skúlan síðani 2002.

Fimm av størstu nøvnunum innan opera og Eivør fara á pall. Og eitt kór, ið telur 200 sangarar. Talan er um operuna "Carmina Burana" eftir Carl Orff.

At Eivør luttekur eru høvuðstíðindi frá konsertunum og DV skrivaði at Eivør goes opera.

Konsertirnar eru fríggjakvøld kl 19:30 og leygardag seinnapart klokkan 15;30.

Fyri fáum døgum síðani skipaði íslendska Rás 2 fyri lurtarakanning fyri at finna útav, hvør tekkiligasta sprund Íslands. Fleiri túsund atkvøddu og Eivør bleiv nummar 10 á listanum, tó fleiri gjørdu vart við, at Eivør er úr Føroyum og tí ikki íslendsk kvinna.